# 25 ár í stórum stíli

**Annikka og Poul Færø úr Klaksvík høvdu verið gift í 25 ár tann 28. apríl. Og tann 26. hildu tey dagin, og ikki færri enn 750 gestir vóru til veitsluna, sum varð hildin í KÍ høllini**

SILVURBRÚDLEYP
*Solby A. Eliasen*

Tað er kalt og grátt í veðrinum. Ein skuldi trúð, at tað var í novembur, men so er tað í apríl. Onkur vil vera við, at tað er lambasprænin, sum nú er komin. Um so er ella ikki, skal her ikki verða sagt, men undir øllum umstøðum, so er tað ikki kalt inni í hugnaliga heiminum hjá Annikku og Poul Færø á Jørundsgøtu í Klaksvík. Poul situr við borðið og lesur Sosialin, meðan Annikka ger kaffi og setur á borðið. Lagið er gott á teimum báðum, og tað sást á øllum brøgdum, at tey eru væl nøgd við teirra stóra dag, sum júst er farin framvið. Annikka hevur framvegis silvur í hárinum, sum varð sera vakurt uppsett til dagin.

Dagurin eydnaðist til fulnar hjá teimum báðum, og allir gestirnir lótu væl at.

### Stórt silvurbrúdleyp

Líka frá stutt eftir, at tey vórðu gift í 1978, hevur Poul tosað um, at hann gleddi seg til silvurbrúdleypið.

- Hann hevur allatíðina tosað um, at silvurbrúdleypið skuldi verða stórt, greiðir Annikka frá. Hon helt sjálv, at tað ljóðaði av øgiliga nógvum í fyrstuni at fara at leiga KÍ høllina til dagin, men tá tað avtornaði, so var onki annað høli í Klaksvík, sum var nóg stórt til at hýsa teimum mongu, sum komu at heiðra parinum á degnum.

- Eg var burtur, tá bílegging av hølum fór fram, men vit vóru samd um, veitslan skuldi standa í Betesda - og um tað blivu ov mong til tað, so fóru vit í KÍ høllina, sigur Poul. Annikka setti seg so í samband við fyristøðumannin í KÍ høllini og bað um at fáa høllina hetta vikuskiftið. Tað var ongin trupulleiki, og so var bara at bíða, til fólk byrjaðu at tekna seg. Rættuliga skjótt var greitt, at Betesda fór at verða alt ov lítið. Tá talið fór upp um tey 400, vistu tey, at tey fóru at halda tað í KÍ høllini. Men talið bleiv við at vaksa og steðgaði ikki fyrr enn tað var farið upp um 700. Og seinasta leygarkvøld sessaðust 750 gestir við tey mongu og vøkru borðini í eini sannari veitsluskríddari KÍ høll.

- Eg kendi øll sum vóru har á navni, sigur Poul, meðan Annikka má viðganga, at hon ikki kendi øll. Men meginpartin kortini. Poul ferðast nógv kring landið sum trúboðari. Og somuleiðis vitjar hann mong menniskju bara av sínum eintingum, og tískil er hann kendur víða hvar. Og tað mundi eisini gera sítt til, at gestirnir gjørdust so nógvir í tali.

Tey bæði viðganga, at tað vóru teir stórslignu ábyrgdararfundirnir hjá Norðoya Sparikassa, sum vóru íblásturin hjá teimum til at halda veitsluna í KÍ høllini. Og tað var sami fráliki kokkurin, sum stóð fyri matgerðini.

Undir borðhaldinum var undirhald av ymsum slagi. Umframt nógvar og góðar røður, so sungu fýra kór. Eitt kvinnukór av Toftum, Betesdakórið, Ebenezerkórið og so eitt manskór úr Betesda.

– Tað seinasta setti rættuligt lív í, siga tey bæði.

Eftir hesa lítlu konsertina hevði Assa, dóttir Annikku og Poul, sett eina lítla mótasýning saman, har hon og nakrar vinkonur úrval av gomlum kjólum hjá Annikku fram.

– Annikku dámar væl at goyma gomul klæðir, so tað var stuttligt at síggja allar tær ymisku útgávurnar av henni gjøgnum hesi 25 árini, sigur Poul og hyggur upp á Annikku.

### Vakurleiki í fólkinum

So flott og so vakurt sum alt var í høllini hetta kvøldið, so heldur Poul tó ikki, at vakurleikin kom til sín rætt, fyrr enn fólkið var komið í høllina at sita.

- Tástani sást, hvussu vakurt og hugnaligt tað í veruleikanum var, sigur Poul, og hann leggur afturat, at tað er ótrúligt, sum nógv fólk hava hjálpt til.

- Og so at síggja, hvussu glað tey tóktust fyri at hjálpa okkum, tað vermir, leggur hann afturat og Annikka nikkar samtykkjandi.

Bæði vilja tey ikki taka nakran fram um, men tey rósa bæði fyrstøðumanninum í KÍ høllini fyri hansara hjálpsemi.

Bæði eru tey samd um, at kvøldið eydnaðist til fulnar. Nógv fólk kom og eisini avbygdafólk, og øll sluppu heimaftur, tí Dúgvan sigldi eftir veitsluna. Tað vildu tey fegin, tí annars høvdu tey flestu av bygd farið avstað aftur, áðrenn borðhaldið var heilt liðugt.

Poul og Annikka sita bæði her nú eftir, at dagurin er farin framvið móð og troytt, men so hjartans fegin og takksom, tí so mong hava gjørt so nógv fyri at gleða tey á teirra silvurbrúdleypsdegi.

*Annikka og Poul Færø hildu eitt stórsligið silvurbrúdleyp í KÍ høllini leygarkvøldið 26. apríl*

*Mynd: Steinvør Fonn*





*750 fólk til borðs í KÍ høllini seinasta leygarkvøld*

*Mynd: Steinvør Fonn*



# Støðuleysir tingmenn

**Lógin um viðgerð av persónsupplýsingum verður ikki broytt í hesi tingsetuni. Formaðurin í Rættarnevndini, Jógvan á Lakjuni, valdi heldur at súlta málið enn at bera tað ófullfíggjað til 2. og 3. viðgerð. Uppskotstillarin, Høgni Hoydal, dugir ikki at síggja tað sum annað, enn at tingmenn ikki tora at taka eina støðu**

POLITIKKUR
*Rúnar Reistrup*

Lógin um viðgerð av persónsupplýsingum, sum løgtingið samtykti í 2001, er sambært løgmálaráðharranum ikki nóg greið í sínum máli um flyting av persónsupplýsingum av landinum. Tí valdi hann fyrr í ár at leggja eitt broytingarupskot fyri tingi, ið ásetur við lóg, hvussu spurningurin um útflutning av persónsupplýsingum til onnur lond skal handfarast.

Men hóskvøldið gjørdist endaliga greitt, at broytingaruppskotið ikki kemur aftur úr rættarnevndini í hesi tingsetuni. Formaðurin í nevndini hevur valt at leggja seg á málið, tí hann metir tað vera ov fløkt at taka støðu til í eftir so stuttari viðgerð.

Tað áliggur soleiðis enn sum áður løgmálaráðharranum at kunngera um, hvussu mannagongdir skuldu vera, tá ið persónsupplýsingar fara av landinum.

### Tora ikki at taka støðu

Tað royndi Høgni Hoydal í fjør, tí hann metti ikki nýggju GjaldSkipanina hjá Elektron vera er í tráð við galdandi lóggávu, men fekk nógv ímóti sær.

Eftir stórt trýst frá vinnuni, serliga frá teimum báðum størstu peningastovnunum og Elektron, valdi løgmálaráðharrin, Høgni Hoydal, at sleppa ætlanini um at kunngera og fór ístaðin niðan í tingið við broytingaruppskotinum til lógina um viðgerð av persónsupplýsingum. Broytingaruppskotið er í sama anda sum ætlaða kunngerðin, men tó minni víðgongd.

Nú málið er súltað, heldur Høgni Hoydal, at lobbyarbeiðið hjá ávísum peningastovnum eisini hevur forðað tingviðgerðini av broytingaruppskotinum, og tað er hann rættiliga harmur um.

- Eg dugi ikki at síggja tað, sum nú hendir, sum annað enn tingmenn ikki tora at taka eina støðu til hetta málið, og tað er ikki nøktandi. Tað verður lagt eitt stórt trýst á tingmenninar frá ávísum peningastovnum, men tað eigur ikki at forða tingmonnunum í at taka eina greiða støðu fyri ella ímóti uppskotinum, sigur ein ónøgdur Høgni Hoydal.

### Ivi allan vegin

Tingsins vilji var allatíðina ivasamur í hesum máli, og tað er hann enn. Tað eru skjótt tveir mánaðir síðan at uppskotið var til 1. viðgerð og varð beint í rættarnevndina 10. mars, men tá løgtingið hevði sín seinasta tingfund í gjár, var málið enn ikki komið aftur úr nevndini og hervið fall tað burtur.

Jógvan á Lakjuni úr Fólkaflokkinum er formaður í rættarnevndini. Hann hevur allatíðina sagt seg ivast í, hvat rættast er at gera í hesum málinum, og hósdagin, dagin undan seinasta tingfundi, var hann enn í iva. Hósmorgunin helti hann tó til at koyra uppskotið í tingið í evstu løtu til 2. og 3. viðgerð, og boðaði limunum í rættarnevndini til fundar klokkan 9 fríggjamorgunin, ein tíma áðrenn tingfundin. Men sama kvøld ringdi hann aftur til umboð fyri flokkarnar og avlýsti fundin. Harvið var greitt, at uppskotið ikki kemur aftur úr rættarnevndini, og harvið fellur tað burtur í hesi tingsetuni.

Ella sum Jógvan á Lakjuni sjálvur sigur tað:

- Eg havi valt at súltað málið.

### Ov stutt tíð

Sambært Jógvani á Lakjuni hevur rættarnevndin havt ov stutta tíð at seta seg nøktandi inn í málið.

- Málið er snøgt sagt ikki búgvið at koyra niðan í tingið aftur. Vit hava havt nógv fólk inni til hoyringar, men eg kann bara ásanna, at eg ikki enn kenni meg nóg vísan í, hvat er rættast at gera, sigur Jógvan á Lakjuni, sum leggur afturat, at um uppskotið fór til 2. viðgerð í gjár, hevði tað verið við einum kravi um, at tað varð endurskoðað í komandi tingsetu. Ein greið ásannan av, at støðan hjá rættarnevndini til uppskotið var ógreið.

Ta frágreiðingina gevur Høgni Hoydal, løgmálaráðharri, ikki nógv fyri. Eftir hansara tykki hava fleiri størri og torførari mál verið viðgjørd uppá styttri tíð, og er sannførdur um, at tað er ein spurningur um politiskt dirvi.

- Tað er ov lætt at siga, at man ikki rættiliga veit hvat man skal halda. Eg meini at løgtingið skyldar okkum øllum at taka eina støðu. Við onga støðu at tora at taka lata tingmenn tað vera upp til tilvildarligar peningastovnar at tulka lógina um persónsupplýsingar sum teimum lystir. Tað er ikki haldbært, sigur Høgni Hoydal.

Løgtingið fór í summarfrí eftir tingfundin í gjár. Tað ber tó til at kalla løgtingið saman aftur og broytingaruppskotið er prinsipielt ikki burturdottið fyrr enn á ólavsøku. Men tað er óvanligt at tingið savnast aftur í úrtíð.



*Í gjár høvdu løgtingsmenninir sín seinasta arbeiðsdag áðrenn summarferiuna, sum varir til ólavsøku*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Jógvan á Lakjuni hevur allatíðina ivast í málinum um persónsupplýsingar. Hósmorgunin helti hann tó til at koyra uppskotið í tingið í evstu løtu til 2. og 3. viðgerð, og boðaði limunum í rættarnevndini til fundar. Men sama kvøld ringdi hann aftur til umboð fyri flokkarnar og avlýsti fundin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Leikudagur ‘ 98

Aftur í ár verður Leikudagur ‘ 98 tann 3 mei. Fyrireikarin Elin Mouritsen sjónleikari, takkar øllum,sum seinastu árini hava gjørt leikudagin so væleydnaðan. Hon vónar,at fólk taka líka væl undir við Leikudegi ‘ 98 í ár. Allar leikur eru kærkomnar,tó helst ikki “ vápn-leikur.” Leikurnar verða lætnar børnum úti í heimi.I fjør fingu børn á barnaheimum í Rumenia gleði av leikunum.

Innsavning verður frá klokkan 13-18 tann 3. mei uttanfyri Ide-Møblar á Hálsi,har ein bingja stendur til endamálið.

## Húsarannsókn á Hamrinum

**Fýra mans vóru hóskvøldið handtiknir fyri at hava smærri nøgdir av rúsevnum uppi á sær**

RÚSEVNI
*Ingrid Bjarnastein*

Hóskvøldið varð ein húsarannsókn gjørd á Hamrinum á Argjum í sambandi við, at fýra mans vórðu steðgaðir í einum bili fyrr um kvøldið. Hesir fýra vórðu allir handtiknir.

– Ein rannsókn var gjørd, og vit funnu smærri nøgdir av rúsevnum, váttar Bergleif Brimvík á Kriminaldeildini á Politigarðinum í Havn.

– Vit arbeiða allatíðina við slíkum málum, og tað kann væl vera, at tað er tí vit høvdu eina ábending um rúsevni, at júst hasin bilurin varð steðgaður.

Bergleif Brimvík leggur afturat, at allir menninir eru kendir hjá politinum.